## KUNNGERÐ

um framløgu av broytingaruppskoti av býarskipan og byggisamtykt fyri Nes kommunu.

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 av 21. mai 1954 við seinni broytingum, hevur kommunustýrið samtykt at gera hesa broyting í býarskipanina og byggisamtyktina fyri Nes kommunu.

**Toftir.**
Nýtt B3 øki sum er fyri fyrsta byggistig á Høganesi.
Øki er burtur av matr. nr. 267a og 746a, og umfatar tað sum í dag eru økini A,B1,E1,H og J, sum blíva strikaði og løgd undir B3 økið og somuleiðis koma partvís B-økið og H-økið at vera løgd undir B3.
Talan er um serstaka byggisamtykt fyri B3 øki á Høganesi og fevnir um støddina-, nýtsluna-, loyvdu bygging- og vegaføringina á økinum.

Broytingarnar eru lýstar við litaðum kortum og uppsløgum, sum eru til skjals á Teknisku deild á kommmunuskrivstovuni í vanligu upplatingartíðunum frá 7. januar til 8. februar 2008.

**Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagið 07. apríl 2008.**

NES KOMMUNA




